Dagf. 2. juni 2021
HMR J. nr. 21/09273-6

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-151/2020 eftir § 52a í tingskipanini um umstøðurnar hjá barnakonum úr Suðuroynni, frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at umstøðurnar hjá barnakonum, sum koma úr Suðuroynni til Havnar at føða, eru nøktandi?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað fyri at bøta um umstøðurnar?
3. Um so er, nær kunnu vit vænta batar á økinum?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at arbeiða fyri, at pápar kunnu fáa endurgjald fyri mista inntøku, tá teir eisini vegna frástøðuna til meginøkið, missa fleiri vikur arbeiði í sambandi við barnsburð?

Svar:

Til spurning 1, 2 og 3

Í oktober 2013 varð farið undir arbeiðið at nútímansgera íbúðir og kømur serliga til barnakonur, sum hava tørv á uppihaldi nærhendis Landssjúkrahúsinum í sambandi við barnsburð.

Gestalonin á Landssjúkrahúsinum umfatar 4 íbúðir á Eirargarði 4, sum allar eru oyramerktar til barnakonur. Tær eru 50 fermetrar, og er ein íbúð á hvørjari hædd, undantikið á ovastu hæddini.

Íbúðirnar eru innrættaðar við køki, stovu, sovikamari og einum eyka kamari við sovisofu við møguleika fyri uppreiðing til tvey børn. Harumframt er ein ferðasong tøk til heilt smá børn.

Arbeiðið við at nútímansgera íbúðirnar fór fram í tíðarskeiðinum 2013 til 2017 og umfataði eina heilrenovering. Eisini vórðu keyptir nýggir møblar til íbúðir og kømur í hesum tíðarskeiði. Seinni eru møblar eftir tørvi útskiftir.

Umframt oyramerktu íbúðirnar til barnakonur, eru 8 kømur við tveimum einmanssengrum og eitt kamar við dupultsong og tilhaldsrúmi, sum kunnu brúkast til avvarðandi og møguliga barnakonur, innan hesar hava átt, um tørvur skuldi verið á tí.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur saman við leiðsluni á Suðuroyar Sjúkrahúsi kannað verandi umstøður. Sjúkrahúsleiðslan metur ikki, at neyðugt er at bøta um fysisku karmarnar aftur enn. Hesa meting tekur landsstýrismaðurin til eftirtektar.

Tó verða møblar skiftir út leypandi og eftir tørvi.

Til spurning 4

Undirritaði landsstýrismaður er ikki vitandi um, at endurgjald fyri mista inntøku, vegna frástøðu til meginøkið, er ein trupulleiki í sambandi við barnsburð hjá avvarðandi. Tískil er hetta ei heldur eitt mál, sum landsstýrismaðurin hevur tikið upp til viðgerð.

Heilsumálaráðið, 2. juni 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður